

*Sum borgarstjóri hevur Heðin Mortensen evstu ábyrgd av ólavsøkuni*

Savnsmynd

at vit vildu hava størri ráðaræði á hesum partinum av ólavsøkutiltøkunum, og tí valdu vit so sjálvir at skipa fyri ólavsøkukonsertini, sigur Heðin Mortensen.

## Fólkafundir og møtir

Eitt, sum hevur sett sín dám á ólavsøkuna, eru nógvu útimøtini, sum samkomurnar skipa fyri. Ólavsøkan í ár er einki undantak í so máta.

– Tað er eisini nakað, vit leggja stóran dent á, skal verða pláss fyri. Og so verður eisini skipað fyri fleiri fólkafundum í ár, og tað er hugaligt. Stórt tiltak verður eisini á Vaglinum ólavsøkudag á miðnátt, har skipað verður fyri miðnáttarsangi og føroyskum dansi. Og í tí sambandi verður stórur dentur lagdur á trygdina, og her á ráðhúsloftinum verður bæði politi, brandmenn og samarittar. Hartil fara sjúkrabilar at standa til reiðar bæði í Mylnugøtu og uppi við Ebenezer, klárir at taka sær av fólki, skuldi óhappið verið úti, sigur Heðin Mortensen.

Tað verður rátt fólki frá at koma við heilt smáum børnum, men tó verður ikki talan um at banna hetta.

– Vit fara at sperra eitt øki av framman fyri kunningarstovuna, og har kunnu so familjur við smábørnum vera, uttan at koma í vanda fyri at verða kroyst, sigur Heðin Mortensen.

Borgarstjórin sigur, at fólk longu nú kunnu fara inn á Snarskivuna at tryggja sær eitt sanghefti til miðnáttarsangin ólavsøkudag. Men skótar fara eisini at deila út sangheftir framman fyri ráðhúsinum tá sangurin er.



*Ólavsøkudag á miðnátt verður miðnáttarsangur og føroyskur dansur á Vaglinum, við umfatandi trygdartiltøkum*

Savnsmynd

– Tað er so, at vit hava fingið eina avtalu við MEST um at fólk, sum seta bilin úti við Skipasmiðjuna, kunnu brúka trappurnar á Sipasmiðjuni og koma heim i býin tann vegin, sigur Heðin Mortensen, sum annars vísir á vanligu parkeringsplássini í býnum.

Ólavsøkan fyllir nógv hjá Tórshavnar kommunu, og vikurnar upp undir hátíðina verður altíð fríðkað um og plantað, so tað verður so hugnaligt sum møguligt.

## Við har hann kann

Tað er einki at taka seg aftur í, at ólavsøkan er tjóðarhátíð Føroya. Men í hvussu stóran mun er hon tjóðarhátíð og í hvussu stóran mun er hon ein býarstevna?

– Tað er einki at ivast í, at tá vit tosa um ólavsøkuna í síni heild, er talan um okkara tjóðarhátíð. Men hinvegin er tað bara Tórshavnar kommuna, sum stendur við ábyrgdini, bæði fíggjarliga og hvat fyrireiking viðvíkur, sigur Heðin Mortensen.

Sum nevnt at byrja við, so kemur ein rúgva av umsóknum inn til býráðið um loyvi til hetta og hatta á ólavsøku.

- Vit útskriva umleið hundrað loyvir út til hvørja ólavsøku. Og tá er tað væl at merkja talan um loyvir uttan um tey vanligu søluloyvini, sum longu framman undan eru í Havn, sigur Heðin Mortensen.

Tað er altíð trupult at velja og vraka millum allar umsóknirnar, men tað eru verri enn so øll, sum fáa játtandi svar.

– Vit royna at játta umsóknunum á tann hátt, at ólavsøkan gerst so fjølbroytt sum tilber. Eisini royna vit at fyriskipa soleiðis, at eitt tiltak ikki skal órógva tað næsta, sigur borgarstjórin.

Og fyri at taka saman um, so er tað Tórshavnar Ítróttaráð, ið ger av, hvør setur ólavsøkuna. Í ár verður tað Njál Djurhuus, og vanliga verða politikarar ikki bidnir til hendan heiður.

Sjálvur ætlar borgarstjórin at vera við har hann kann.

– Fyrst og fremst fari eg at taka ímóti træseglskipunum, sum koma á Havnina ólavsøkuaftan beint undan døgurða. So verður tað sjálvandi kappróðurin og fótbólturin, og so verið eg sjálvandi til staðar, meðan ráðhúsið er opið fyri almenninginum, sigur Heðin Mortensen.

Hann er við í øllum liðum av fyrireikingini, antin tað so er at taka støðu til, hvør fær søluloyvi á ólavsøku ella tað er at plasera tiltøkini.

– Eg haldi, at ólavsøkan hevur pláss at vaksa nakað enn, men meiri týdningarmikið er eisini pláss fyri, at ymsu tiltøkini hækka í dygd, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri, nú tað av álvara stundar til ólavsøku.